# Lív komið í aftur í Hvalba

**Klokkan átta í gjáramorgunin fóru tey aftur til arbeiðis á flakavirkinum í Hvalba, eftir at virkið hevur ligið stilt í langa tíð**

FISKAARBEIÐI
*Áki Bertholdsen*

**Hvalba:** Nú er lív komið í aftur í flakavirkinum í Hvalba.

Flakavirkið hevur ligið stilt í meiri enn eitt ár, men klokkan átta í gjáramorgunin vóru dyrnar lætnar upp aftur.

Síðani eitt samtak av klaksvíkingum og hvalbingum keyptu virkið, hevur verið arbeitt við at gera virkið ístand, so at tað kundi taka ímóti fiski.

Og mánadagin var komið so langt, at fyrsta fiskarúgvan kundi keypast á uppboðssøluni.

Hesuferð keyptu tey bara 10 tons av upsa at royna maskinurnar við og klokkan átta í gjáramorgunin fóru ímillum 20- 30 fólk til arbeiðis á virkinum.

Nakrir byrjanartrupulleikar vóru í gjár, men tað høvdu teir væntað. Tá ið maskinurnar eru stillaðar inn, sum tær skulu, verða eini 40-50 arbeiðspláss á virkinum.

Nú flakavirkið í Hvalba letur upp aftur, verður tað undir navninum Suðurís. Tað verður ein partur av samtakinum, sum Johan Páll Joensen hevur saman við øðrum. Frammanundan eru Norðís á Eiði, Eysturís í Klaksvík, Vestís í Vágum í samtakinum, men nú kemur so eisini eisini Suðurís í Hvalba uppí.

– At tað eru fleiri virki í samtakinum, gevur tað okkum nakrar fyrimunir, sum gera raksturin bíligari. Eitt nú kunnu vit keypa fisk og vørur og tilfar í felag, vit kunnu hava felags sølu o.s.fr.



Í gjár var ein dagur, sum hvalbingar hava trákkast eftir longi, tí tá læt flakavirkið uppaftur. Eini 40-50 arbeiðspláss verða á virkinum

### Byggir á fiskivinnuna á staðnum

Johan Páll Joensen, sum er stjóri á virkinum, sigur, at nú virkið letur uppaftur, verður tað við grundarlagi í tí fiskivinnu, sum er í Hvalba frammanundan.

Sostatt fer virkið fer í mesta mun at taka ímóti kongafiski, svartkalva og upsa frá djúpvatnstrolarunum, eins og tað gjørdi frammanundan.

Hann sigur, at bátarnir fiska eini 5.000 tons um árið og, men at teir hava sett nøsina upp ímóti, at nýggja virkið í Hvalba skal taka ímóti 4.000 – 4.500 tonsum um árið.

Tað er eitt felag hjá Johan Páll Joensen, sum eigur helvtina av virkinum í Hvalba. Hina helvtina eiga hvalbingar, við teimum báðum trolarunum Steintór og Niels Paula, arbeiðsmannafelagnum og Arbeiðskvinnufelagnum, á odda.

Í sambandi við virkið nú letur upp aftur, er eitt ognarfelag stovnað. Hetta felagið eitur »Flakavirkið í Hvalba« og tað felagið eigur bygningarnar og annars tær ognir, sum eru í virkinum.

Men síðani er eitt annað felag stovnað, sum eitur »Suðurís« og sum skal standa fyri sjálvum rakstrinum og sum leigar ognirnar frá Flakavirkinum í Hvalba til endamálið.

Hvalbingar og klaksvíkingar eiga hvør sína helvt í báðum feløgunum.

Johan Páll Joensen sigur, at virkið kostaði tríggjar milliónir at keypa, men partapeningurin í feløgunum, sum eiga og skulu reka tað, er útvið seks milliónir.

Men nú virkið stendur klárt at taka ímóti fiski, stendur tað teimum í umleið 10 milliónum.

Virkisleiðari á virkinum verður Jens Sofus Thomsen úr Hvalba.



*Mánakvøldið var móttøka á virkinum, har tað var víst fram fyri almenninginum. Her er tað stjórin á virkinum, Johan Páll Joensen, vm, í práti við Svein Poulsen, skipara á Niels Paula, sum saman við hinum hvalbiartrolaranum, Steintór og arbeiðarafeløgunum í Hvalba, eru høvuðsstuðlar undir virkinum*

# Byggja brýr um Atlantshav

**Føroyingar hava verið við á eini ráðstevnu í Skotlandi, sum er ein liður í royndunum at fáa størri samstarv ímillum londini í útnorðri**

ATLJÓÐA SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*

Londini, sum liggja við Atlantshav, hava nógv, sum tey áttu at samstarva um. Og tað verður av álvara roynt at bryggja brýr ímillum hesi londini.

Í gjár var ein ráðstevna í Skotlandi, har umboð í Føroyum vóru við og endamálið við hesi ráðstevnuni er júst at menna samstarvið ímillum hesi londini, ið liggja við Atlantshav. Hugsað verður um Føroyar, Ísland, Grønland, Skotland, Hetland, Orknoyar, Suðuroyggjar og Írland, men eisini heilt vestur um hav til Ný Fundland.

– Hetta er eitt gylt høvi hjá okkum at knýta bond ímillum føroyingar og aðrar tjóðir í útnorðri sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í Norðurlandamálum, sum var við á ráðstevnuni.

Annars er Jógvan á Lakjuni, formaður í útnorðurráðnum og Katrin Dahl Jacobsen, varalimur hjá Jóannes Eidesgaard í Norðurlandaráðnum, eisini við úr Føroyum á ráðstevnuni.

Tað er Ráðharraráðið í Norðurlandaráðnum og tingið í Skotlandi sum skipa fyri ráðstevnuni undir heitinum Størri samstarv í útnorðri.

### Stórur dentur

Størri samstarv í útnorðri er ett mál, sum føroyingar hava lagt stóran dent á.

– Seinastu árini hevur Norðurlandaráðið gjørt nógv burturúr at víðka samstarvið til grannalondini. Men higartil hevur bert verið tosað um grannalondini hjá teimum stóru londunum, eitt nú Baltalond, Russland og ES.

– Hinvegin hava vit sagt, at skulu Norðurlond ikki detta av um tvøran og skulu vit framyvir síggja Norðurlond sum eina heild, má samstarvið við triðjalond eisini umfata grannalondini hjá okkum í útnorðri, Føroyum, Íslandi og Grønlandi, sigur Høgni Hoydal.

– Tí eru vit fegin um, at Norðurlandaráðið tekur undir við okkum í hesum og seinastu tíðini eru fleiri stig tikin, fyri at fremja samstarvið í útnorðri.

Høgni Hoydal sigur, at sostatt gongur rætta vegin og nú hevur Norðurlandaráðið samtykt at seta eina nevnd at kanna, hvussu tað ber til at styrkja leiklutin hjá londunum í útnorðri og samstarvið ímillum londini í útnorðri og grannalondini hjá teimum.

Hann leggur afturat, at tey ensktmæltu londini framvið Atlantshavi eru eisini ógvuliga áhugað í at styrkja samstarvið.

### Sjálvsagt

Høgni Hoydal heldur, at tað er sjálvsagt at londini við Atlantshav samstarva, tí tað eru nógv øki, har tað er ein fyrimunur fyri øll, at tey finna eitt felags stev.

Eitt nú verður hugsað um havumhvørvið og um, hvussu havsins ríkidømi verður best gagnnýtt. Men hugsað verður eisini um mentanarligt og handilsligt samstarv.

Hann sigur, at í løtuni er ikki ætlanin at skipa eitt formligt samstarv ímillum hesi londini, eins og Norðurlandaráðið.

– Men vit ætla at fáa í lag árligar fundir ímillum politisk umboð úr øllum hesum økinum og at menna samstarvið tann vegin, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at kemur verulig gongd á hetta samstarvið, er tað ein veldugur fyrimunur fyri tey londini í útnorðri, sum ikki eru limir í ES.

– Fáa vit eitt samstarv ið Skotlands, kann hetta verða eitt portur hjá okkum inn í ES og eitt portur til samstarv við ES, hóast vit ikki eru limir.

Sum eitt dømi um tað, nevnir hann granskingarsamstarvið ið nevnist »Norrøni Útjaðarin«, har bæði Skotland, Føroyar og Ísland eru við og betala hvør sín part av útreiðslunum. Men tað er eitt samstarv, sum ES eisini letur stuðul til, hóast vit ikki eru limir.

– Tað er henda vegin, vit spakiliga skulu byggja eitt slíkt samstarv út, heldur Høgni Hoydal.

Og so leggur hann afturat, at tað er heldur ikki at forsmáa, at bæði Føroyar og Ísland eru í bólki við Skotlandi í undankappingini í fótbólti, tí eisini tað er við til at knýta bond.



# Kann fáa upp í 4 ára fongsul

**Týsmorgunin byrjaði rættarmálið móti tí 25 ára gamla manninum, sum fyri góðum tveimum mánaðum síðan nýtti byrsu í Magnus Heinasonargøtu í Havn. Maðurin er millum annað skuldsettur fyri drápsroynd móti politistunum, ið royndu at handstaka hann, henda mikumorgun í september. Maðurin viðgongur, at hann hevur skotið móti politistunum, men noktar seg sekan í drápsroynd.**



*25 ára gamli maðurin viðgongur, at hann hevur skotið móti politistunum, men noktar seg sekan í drápsroynd. Endamálið var ikki at raka politistarnar. Málið byrjaði í Føroya Rætti týsmorgunin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

RÆTTARMÁL
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Ein 25 ára gamal maður úr Havn er skuldsettur fyri drápsroynd móti tveimum løgreglufólkum, ið vóru til arbeiðis, mikumorgunin tann 11.september í ár. Hetta er tann álvarsligasta av fleiri ákærum, ið kunnu geva upp til fýra ára fongsul. At ovara markið er sett til fýra ár, gingu bæði verji og ákæri við til. Málið byrjaði í Føroya Rætti týsmorgunin.

Hendingin fór fram í Magnus Heinasonargøtu í Havn, um seks tíðina um morgunin, mikudagin tann 11.september. Politiið verður boðsent á staðið til tann 25 ára gamla. Hann er drukkin, hevur byrsu hjá sær, og er tíðiliga ikki væl fyri sálarliga. Tvey løgreglufólk koma á staðið, er maðurin komin út á trappuna. Hjá sær hevur hann eina høglbyrsu og eina vodkafløsku. Endin er at eitt skot frá høglbyrsuni smellir í politibilin, ið stendur umleið 21 metrar harfrá. Skotið rakar beint við mannliga politistin, ið beint áðrenn hevur fingið goymt seg aftanfyri bilin. Síðan eydnast tað politinum, eftir at hava skotið tvey skot, eitt ávaringarskot upp í loft, og eitt skot, ið var ætlað at raka tann 25 ára gamla í beinið, at handtaka mannin.

25 ára gamli maðurin hevur sitið varðhaldsfongslaður líka síðan 11. september. Tvær ferðir er varðhaldsfongslingin longd, meðan kanningararbeiðið er farið fram. Millum annað hava serfrøðingar úr Danmark hjálpt politinum við kanningararbeiðinum, og gjørd er ein eftirgerð, ein »rekonstruktión«, av tí, sum fór fram í Magnus Heinasonargøtu 11. september.

Eftir at kanningarnar eru lidnar, hevur ákærin gjørt av at grundarlag er at ákæra mannin fyri drápsroynd móti tveimum politistum. Ákærin vísir á, at maðurin skeyt við høglbyrsu beinleiðis móti politistunum, ið stóðu 21 metrar burtur. Eisini er maðurin skuldsettur fyri at sigta við byrsu móti politistunum, og beinleiðis seta teirra lív og heilsu í vanda. Umframt fongsulsrevsing hevur ákærin reist eitt endurgjaldskrav uppá umleið 35.000 krónur móti manninum. Hetta er tað, ið tað kostaði at gera politibilin, ið varð raktur av skotinum frá høglbyrsuni, aftur. Afturat hesum kemur eitt umleið fýra mánaðir eldri mál, snýr seg um, at tann 25 ára gamli hevur skotið ein postkassa við eini aðrari høglbyrsu.

Í Føroya Rætti týsmorgunin játtaði tann 25 ára gamli maðurin at hava latið skot av móti politistunum. Men hann noktar, at hann ætlaði at raka politistarnar. Hann greiddi frá, at hann henda mikumorgun var sera drukkin. Hann hevði drukkið umleið hálva aðru vodkafløsku, og hann var heldur ikki serliga væl fyri sálarliga. Eftir at tað gjørdist honum greitt, at politiið var komið eftir honum, fór hann útum. Við sær hevði hann byrsuna, ið longu tá var lødd, og harumframt eina vodkafløsku. Maðurin greiddi frá, at hann ætlaði bara at fáa politistarnar at fara avstað aftur. Hann hugsaði tó, at politistarnir helst ætlaðu at taka byrsuna og koyra seg í brummuna.

Eftir at hava sitið og prátað við politistarnar í umleið fimm minuttir, reisir hann seg og fer yvirum vegin, har hann setir seg á eina aðra trappu. Hann vil síggja betri, hvussu nógvir politistar eru komnir. Maðurin tekur byrsuna upp, peikar móti politistunum og biður teir um at sleppa sær burtur. Eftir umleið 20 minuttir hevur hann fingið nóg mikið. Hann reisir seg upp, og siktar móti politistunum við byrsuni. Hann helt seg duga at síggja, at annar politisturin sat aftanfyri politibilin, meðan hin stóð aftan fyri húsahornið við hárfríðkanarstovuna har í grannalagnum. Í rættinum greiddi maðurin frá, at hann siktaði móti bilinum, men lyfti síðan byrsuna eitt sindur upp, fyri at vera vísur í, at hann ikki rakti politistarnar. Hann trýstið síðan á avtrekkjarar, og skotið smellur í bakrútin á politibilinum og í annan bakstólpan á bilinum.

Politisturin, sum í hesi løtu sat aftanfyri politibilin, segði í síni vitnisfrágreiðing í rættinum týsmorgunin, at bara umleið tvey sekund gingu, frá tí at hann bukkaði seg, til skotið brast í bilin. Hann sigur, at triðji politisturin, ið var komið á staðið nakað seinni, ávaraði hann umvegis politivarpið, og at hann dukkaði seg í somu løtu sum ávaringin kom. Tí metti hann, at tað bara gingu umleið tvey sekund frá tí at hann bukkaði seg niður, til skotið small.

Verjin hjá tí 25 ára gamla manninum setti spurnartekin við, um tað veruliga gekk so stutt tíð, frá tí at politisturin bukkaði seg, til tann 25 ára gamli skeyt. Hann legði dent á, at hetta er rættuliga umráðandi, tá dómurin skal ásetast.

### Umfatandi mál

Rættarmálið við tí 25 ára gamla manninum er rættuliga umfatandi. Sum nevnt hava serfrøðingar úr Danmark verið í Føroyum og gjørt kanningar í samband við tilburðin, fyri at fáa staðfest, hvat veruliga fór fram, og um talan er um drápsroynd móti politistum. Serliga ákærin, men eisini verjin, nýttu nógvar av eftirgjørdu myndunum í síni prógvførslu fyri at lýsa hendingina í Magnus Heinasonargøtu. Ákærin roynir í sínum lagi at prógva, at talan veruliga var um drápsroynd, og at politistarnir vóru í beinleiðis lívsvanda, henda mikumorgun fyri góðum tveimum mánaðum síðan. Eydnast tað ikki ákæarnum at fáa mannin dømdan fyri drápsroynd, so fer hann at krevja, at maðurin verður dømdur fyri at hava komið lívinum og heilsuni hjá politistunum í vanda.

Harðasta revsing í tílíkum málum liggur væl omanfyri fýra ár, men longu nú er greitt, at maðurin í mesta lagi fær fýra ár. Kemur tað uppá tal at revsingin kann gerast meira enn fýra ár, skal eitt nevningating taka støðu til tað. Men í rættinum søgdu bæði ákæri og verji seg taka undir við, at revsingin í mesta lagi gerst fýra ár, og tí vóru eingir nevningar til staðar.

Ákæri og verji vóru ikki liðug við avhoyringarnar av vitnum, tá blaðið fór til prentingar, og enn er ikki greitt, nær málið kemur til dóms.




Tlf. 21 31 51 Tommy
Tlf. 21 31 54 Benny
Fax 31 08 38
Postboks 3158
FO-110 Tórshavn